# Gerðabók í sambandi við býráðsfund nr. 10/2021

**Dagfesting:** 28.10.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 21/00071-11

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Magni Jøkladal og Gudny Vang

Tiltakslimur: Lillian Jacobsen, ið var tiltakslimur fyri Ólavur Larsen, býráðslim, ið hevði forfall til fundin.

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 43/21 | 21/00062-1 | Visjón og politikkir hjá Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024 |
| 44/21 | 21/00549-2 | Privatlívspolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu - dátuverndarkunning |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**43/21**
**21/00062-1 Visjón og politikkir hjá Fuglafjarðar býráð valskeiðið 2021-2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 4/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 43/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing | Borgarstjórin ynskir at arbeiða við yvirskipaðum málum og politikkum á teimum ymisku økjunum fyri at menna Fuglafjarðar kommunu fram á leið. Í hesum sambandi hava borgarstjórin og kommunustjórin umrøtt visjóns- og politikkfyrireikandi arbeiði, sum borgarstjórin ynskir til umrøðu á býráðsfundinum<br><br>Viðlagt málinum eru uppskot til byrjanina til at orða ávíkavist starvsfólkapolitikk og bústaðarpolitikk, sum bygnaðarliga eru kjølfest í fíggjarnevndini, men har tað eigur at verða arbeitt tvørpolitiskt og-fakligt um hesi bæði politikk-øki eins og onnur politikk-øki, eitt nú vinnu- og havna-, mentanar, sosial- og orku- og umhvørvispolitikk.<br><br>**Framhald 24. oktober 2021**<br>Við støði í framløguni hjá borgarstjóranum á evnisdegnum um fíggjarætlanina 2022, sum varð hildin í hølum hjá Dugna á Kambsdali tann 20. oktober í ár, ynskja borgarstjórin og kommunustjórin, at býráðið hevur eitt miðvíst visjónsarbeiði restina av valskeiðinum. Í hesum sambandi, at tað verður fyriskipaður ein evnisdagur í januar/februar 2022 hesum viðvíkjandi.<br><br>Framløgan hjá borgarstjóranum til umrøðu á býráðsfundinum, har býráðið hevur høvið at koma við einum yvirskipaðum rætningi við atliti at visjón, raðfestingum og høvuðsavbjóðingum komandi árini. |
| Bakgrund | Ynski hjá borgarstjóranum, at arbeiða við yvirskipaðum málum og ítøkiligum politikkum. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Kommunufulltrúin**<br>**Fíggjarætlanin**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl |

2

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Framløga hjá Dávur Juul, borgarstjóra, í sambandi við evnisdagin hjá býráð og umsiting um fíggjarætlanina 2022, sum varð hildin í hølum hjá Dugn á Kambsdali tann 20. oktober 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nakað |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at býráðið byrjar umrøðuna av yvirskipaðari visjón og politikkum innan tey ymisku økini hjá Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Framhald 24. oktober 2021**<br>Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at býráðið umrøður innihaldið í framløguni hjá borgarstjóranum, dagfest 20. oktober 2021, við atliti at visjón, raðfestingum og høvuðsavbjóðingum komandi árini, og í hesum sambandi fyriskipan av einum evnisdegi fyrst í komandi ári. | | |
| Dagf | 23. januar 2021 | | |



**<u>Býráðið 28. januar 2021:</u>**
Sambært tilmæli frá borgarstjóranum tók býráðið einmælt (9-0) undir við, at arbeiða víðari við einari visjón fyri Fuglafjarðar kommunu og politikkum á teimum ymisku økjunum. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at føstu nevndirnar arbeiða ítøkiliga víðari við politikkum í nevndunum soleiðis at politikkirnir við málum verða meira ítøkiligir fram ímóti sumri.

**<u>Býráðið 28. oktober 2021:</u>**
Býráðið umrøddi visjónir fyri Fuglafjarðar kommunu grundað á framløgu hjá borgarstjóranum á evnisdegnum um fíggjarætlanina 2022, sum varð hildin í hølum hjá Dugna á Kambsdali tann 20. oktober í ár. Framløgan hjá borgarstjóranum tók støði í teimum visjónum, sum meirlutin í Fuglafjarðar býráð hevur fyri valskeiðið 2021-2024. Býráðið var samt um, at seta enn meira ferð á visjónsarbeiði í teimum einstøku nevndunum.

## 44/21
## 21/00549-2 Privatlívspolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu - dátuverndarkunning

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.09.2021 | 42/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 44/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Dátueftirlitið vendi sær tann 14. september í ár skrivliga til Fuglafjarðar kommunu og heitti á kommununa, um at lata eftirlitinum frágreiðing um hvussu Fuglafjarðar Kvøld- og ungdómsskúli lýkur kunningarskylduna sambært § 23 í dátuverndarlógini – løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum. Samsvarandi § 23 í nevndu lóg skal kommunan sum dátuábyrgdari kunnað skrásetta borgaran, tá kommunan skrásetir persónupplýsingar hjá viðkomandi.<br><br>Í sama brævi heitir Dátueftirlitið á kvøldskúlan um at lata eftirlitinum skrivligar mannagongdir fyri, nær og hvussu kvøldskúlin strikar upplýsingar um persónar, sum eru skrásettir í skipanini hjá kommununi. Freistin fyri at lata hesar upplýsingar, ásetti Dátueftirlitið til at verða tann 27. september 2021.<br><br>Áheitanin hjá Dátueftirlitinum til Fuglafjarðar kommunu tekur støði í at nevnda dátuverndarlóg frá 1. januar í ár hevur ásetingar um, at almennir myndugleikar og privatar fyritøkur skulu arbeiða miðvíst við at verja persónupplýsingar, sum verða viðgjørdir hjá eitt nú kommununi. Ásetingarnar í dátuverndarlógini taka støði í ES fyriskipanum og hugtakinum GDPR – General Dato Protection Regulation – har myndugleikar skulu hava ein persón starvssettan, sum eisini tekur sær av hesum økinum, nevndur DPO – Data Protection Officer. Hjá Fuglafjarðar kommunu er henda uppgáva fyribils útveitt til uttanhýsis ráðgeva Jens Christian Olsen, Sp/f Eirin, sum er DPO hjá kommununi og sum hevur gjørt uppskot til fyriliggjandi privatlívspolitikk til Fuglafjarðar býráð á góðkenna.<br><br>Tá nevnda áheitan kom frá Dátueftirlitinum hevur Jens Christian Olsen arbeitt saman við kvøldskúlaleiðaranum og kommunustjóranum um at fáa tilevna privatlívspolitikkin, sum saman við øðrum viðkomandi skjølum, varð sendur Dátueftirlitinum mánadagin tann 27. september í ár. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Framhald 24. oktober 2021**<br>Býráðið ynskti á síðsta býráðsfundi tann 30. september í ár, at fáa meiri kunning um dátuvernd og persónupplýsingarlógina, áðrenn støðutakan til uppskot til privatlívspolitikk. Tí er Jens Christian Olsen, DPO – Data Protection Officer – og fyribils dátuverndarfólk hjá Fuglafjarðar kommunu, biðin um at hava eina framløgu fyri býráðnum áðrenn býráðsfundin 28. oktober í ár um persónupplýsingarlógina, dátuvernd og GDPR. |
| Bakgrund | Áheitan frá Dátueftirlitinum við støði í § 23 í dátuverndarlógini. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Dátuverndarlógin – løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til prívatlívspolitikk hjá Fuglafjarðar kommunu, dagfest 27. september 2021** |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til, at býráðið góðkennir fyriliggjandi uppskot til privatlívspolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Framhald 24. oktober 2021**<br>Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, aftaná at Jens Christian Olsen, DPO, hevur kunnað býráðið nærri um persónupplýsingarlógina, dátuvernd og GDPR, at góðkenna fyriliggjandi uppskot til privatlívspolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu. |
| Dagf | 26. september 2021 |



**Býráðið 30. september 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at útseta viðgerðina av fyriliggjandi uppskoti til privatlívspolitikk fyri Fuglafjarðar kommunu til ein seinni fund, og ynskir býráðið eina nærri kunning frá ráðgevanum um nýggju persónupplýsingarlógina og viðurskifti kring dátuvernd.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at samtykkja privatlívspolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu.

Fundurin lokin kl. 20:05.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Magni Jøkladal

Gudny Vang

Lillian Jacobsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo